DAGSINS MEINING

Liggur sum hann hevur rætt

Alt bendir á, at ta› er so alvorliga gali› í samgonguni, at vit antin fáa eina n‡ggja samgongu ella eitt n‡val. Hetta má vera náttúrliga avlei›ingin, nú rok er millum samgonguflokkarnar um fleiri stórmál sum fullveldi, skattalætta, eftirløn osfr. Í dag ver›ur ein veljarakanning kunngjørd og er ta› okkara meting, at samgongan fer at fáa veljarans dóm í hesi kanning. Og hesin dómur kann lættliga blíva, at Tjó›veldisflokkurin eigur at fara úr samgonguni. Tjó›veldisflokkurin vi› n‡ggja formanni sínum kann bara takka sær sjálvum fyri, at fullveldismáli› enda›i sum stig fyri stig politikkur, tí flokkurin leg›i upp til eina ætlan, sum hann átti at vita› full uppbakking ikki var fyri í fólkinum. Men Fólkaflokkurin og Sjálvst‡risflokkurin eru so sanniliga eisini sekir í tí stø›u, sum samgongan er komin í. Tí teir hava bara gó›tiki› alt, sum Tjó›veldisflokkurin hevur sagt. Nú at vaska hendur sínar sum eitt nú sjálvst‡risflokkurin ger er einki minni enn at renna frá teirri ábyrgd hava lati› upp í hendurnar á varaløgmanni. Avlei›ingin av hesum átti tí at veri› eitt n‡val.

Løgma›ur er í eini sera torførari stø›u nú undan landsfundi floksins. Tí skal hann halda or›, er hann noyddur at kvitta vi› Tjó›veldisflokkin. Eftir at forma›ur Tjó›veldisfloksins eftir semjuna fór at tosa um eina seks ára ætlan, er løgma›ur komin vi› eini ávaring. Ver›ur áramál tiki› fram aftur, so er ta› út. Nú hevur so mentamálará›harrin, i› eisini er tjó›veldisma›ur, melda› út til íslendska útvarpi›, at ætlanin er at taka fullveldi› um 6 ella 7 ár. Harvi› hevur hann sum landsst‡risma›ur skapt sínum flokki ein trupulleika. Tí hann hevur ikki akta› or› løgmans um ikki at tosa um áramál í n‡ggju samgonguætlanini. Hvat ger løgma›ur nú!!!

Ta› er stórt spell, at Tjó›veldisflokkurin og Javna›arflokkurin eftir øllum at døma eru vornir "lívsfíggindar", tí flokkarnir hava so ella so sta›i› fyri somu vir›um í politikki og hava fyrr kunna› sta›i› saman í strí›num móti teimumví›gongdu á høgravonginum. Hev›i Tjó›veldisflokkurin duga› sær høgv og virt vanligu demokratisku spælireglurnar, tvs. eisini lodda d‡pi› í øllum fólkinum, hev›i veri› ø›rvísi statt. Nú at geva formanni Javna›arfloksins og Nyrup alla skyldina fyri, at fullveldisætlanin fór fyri bakka, er langt úti. Virdi hann Javna›arflokkin naka›, hev›i hann tryggja› sær, at hesin eisini kom í landsst‡ri›. Men hann vildi hava alt og fekk einki. At tjó›veldisfólk eru farin at kalla javna›arfólk fyri landasvíkjarar vísir, hvussu langt úti tey eru. Ta› er spell, tá hugsa› ver›ur um, at hesir flokkar í hvussu er fyrr, hava kunna› tosa› sama mál og strí›st fyri tí.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Gullbrúdleyp í Porkeri

Leygardagin 18. november, kunnu hjúnini Irena og Kristian Olsen í Porkeri halda gullbrúdleyp. Irena er úr Porkeri, me›an Kristian er ætta›ur av Tvøroyri. Irena hevur havt postin í bygdini um hendi frá 1959 til 98, tá hon leg›i frá sær vegna aldur.

Kristian lærdi til timburmann á Tvøroyri og fór seinni ni›ur á Haslev at læra til timburmeistara.

Øll tey bestu árini, frá 1953 til 75, arbeiddi hann sum arbei›sforma›ur fyri danskt byggifelag í Grønlandi. Veturin 1963 var øll familjan í Grønlandi, har tey bú›u í Holsteinsborg. Í 1975 byrja›i hann sum arbei›sformadur hjá byggifelagnum Danberg og Sørensen, har hann millum anna› var vi› til at byggja Polarfrost í Vági, Skúlan á Trø›ni, Útvarpshúsi› og Nor›urlandahúsi›.

Í 1984 leita›i hann su›ur aftur og arbeiddi tey sí›stu árini hjá byggifelagnum K. S. O. og var vi› til at gera ferjuleguna á Drelnesi og Millumbylgjusendaran í Akrabergi.

Sjálvt um bæ›i nú hava nátt pensiónsaldurin, ver›ur ikki ligi› á latu sí›uni. Kristian fæst vi› sey›ahald og hevur verksta› í kjallaranum, har ymiskt træarbei›i fer fram. Irena røktar vakra urtagar›in, málar postalín og vevar alskyns pløgg.

Irena og Kristian eiga f‡ra børn. Gudfinn, Mannbjørn, Sigmund og Rannvá, i› øll búgva í Porkeri. Harafturat eru tey vælsigna› vi› 10 ommu/abbabørnum.

Spurnarkassi í Sosialinum

Í bla›num t‡sdagin fara serfrø›ingar at svara spurningum frá lesarum

Spyr@sosialurin.fo

Eirikur Lindenskov og Turi› Kjølbro

Sosialurin er nú farin undir stóran spurnarkassa *Spurnarkassin - tit spyrja, vit svara*, har serkøn á ymiskum økjum svara spurningum frá lesarum. Høvi ver›ur at spyrja um nærum alt. Til pedagogin: hví lurta børnini ikki eftir, tá i› eg tosi vi› tey. Til prestin: Nú siga granskarar, at Adam og Eva vóru ikki fyrstu menniskjuni jør›. Hvørjum skulu vit trúgva?

Til løgregluna: Hvussu skal eg bera meg at, tá i› eg síggi ein og sama bilførara koyra ov skjótt eftir vegnum, har vit búgva? Og mangar a›rar spurningar kunnu tit nú seta hesum brei›a skara av fólki. Tit kunnu antin skriva bræv, senda fax, senda teldubræv ella fara inn á heimasí›una hjá Sosialinum vi› spurningum. Vit mæla fólki til at skriva greitt og t‡›iligt.

Bergur Hansen, djóralækni

Heri Joensen, prestur

Heri Kragesteen, sálarfrø›ingur

Ingi Højgaard, løgfrø›ingur

Jens Andreassen, lækni

Jóhanna á Tjaldrafløtti, fø›slu/húsarhaldsfrø›ingur

Jón Klein Olsen, politistur

Jón Kragesteen. Fer›slutrygd

Julianna Næs, pedagogur

Sjúr›ur Johannesen, sosialrá›gevi

Turid Thomsen, lestrarveglei›ari

Marius Staksberg, málfrø›ingur

Adressan:

Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost: spyr@sosialurin.fo

– og merki›, hvørjum tit seta spurningum.

Fyrstu svarini ver›a í bla›num komandi t‡sdag.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Kanningin av Sernámsdeplinum:

Nevndin er manna›

Landsst‡risma›urin hevur nú sett nevndina, sum skal endavenda Sernámsdeplinum og øllum tí sernámsfrø›isliga økinum

KANNING
Ey›un Klakstein

Torbjørn Jacobsen hevur nú sett eina trímanna›a nevnd, sum skal kanna Sernámsdepilin og alt ta› sernámsfrø›isliga øki›.

Forma›ur í nevndini ver›ur løgfrø›ingurin Hans Trygvi Teirin, og afturat honum ver›a Tóra Tóroddsdóttir og Steintór Rasmussen í nevndini.

– Nevndin hevur fingi› seinastu freist at gera eitt tilmæli til tann 1. oktober komandi ár, men hon hevur fingi› bo› um at arbei›a so skjótt sum gjørligt, sigur Torbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur.

Nevndin fær møguleika at seta ein samskipara í hálva tí› og at seta undirbólkar at arbei›a vi› serligum økjum, um hon ynskir ta›.

Eingin heksajakt

Vi›urskiftini á sernámsfrø›isliga økinum hava veri› nógv frammi í ljósinum seinastu tí›ina.

Funnist hevur veri› at løgfrø›isliga grundarlagnum undir Sernámsdeplinum, og løgfrø›ingarnir ivast í heimildunum fyri at reka stovnin.

Lei›slan á Sernámsdeplinum avgjørdi at siga seg úr starvi fyri tveimum vikum sí›ani, tá landsst‡risma›urin samstundis avdúka›i, at hann ætla›i at seta eina nevnd at kanna Sernámsdepilin og øki›, sum stovnurin umsitir.

– Hetta skal ikki skiljast sum nøkur heksajakt, men vit mugu hava trygd fyri, at brúkarin hevur vir›ilig vi›urskifti og at alt er í lagi løgfrø›isliga. Og ta› skal ver›a so nógvur opinleiki sum gjørligt um máli›, sigur Torbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur.

Hans Trygvi Teirin

Tóra Tóroddsdóttir

Steintór Rasmussen

Fyri løgtingi›

Torbjørn Jacobsen sigur, at eingin endalig avger› ver›ur tikin um Sernámsdepilin ella sernámfrø›isliga øki›, fyrr enn nevndin er li›ug vi› sítt arbei›i› og hevur gjørt eitt tilmæli.

– Løgtingi› hevur ongantí› fingi› høvi at siga sína hugsan í hesum máli, og tí ver›ur tilmæli› møguliga lagt fyri tingi›, so ta› kann siga sína hugsan, sigur Torbjørn Jacobsen.

Landsst‡risma›urin sigur, at arbei›i› hjá nevndini er umfatandi, men at hann hevur sett eina seinastu freist fyri, nær arbei›i› skal ver›a li›ug.

Útoyggjaáliti›seinka›

Samskiparin av útoyggjaverkætlanini vónar, at álti› kann handast løgmanni í hesum árinum

ÚTOYGGJAR
Ey›un Klakstein

Ætlanin var, at útoyggjanevndin skuldi handa løgmanni álit sí›st í hesum mána›inum, men arbei›i› er seinka› av millum anna› sjúku, og tí ver›ur áliti› ikki handa› til ásettu tí›ina.

– Vit vóna, at ta› fer at bera til at handa áliti› í desember mána›i, sigur Olga Biskopstø, sum er samskipari av arbei›num hjá útoyggjanevndini.

Enn manglar onkur nevndarfundur í útoyggjanevndini, men ætlanin er at halda hesar fundir sum skjótast.

Seinasti parturin av arbei›num er at skriva áliti›, og ta› er sjálvandi drúgt arbei›i›. Í løtuni er samskiparin í holt vi› at skriva álit i›.

Ger ítøkilig uppskot

Ta› var løgma›ur, sum setti útoyggjanevndina at arbei›a vi› spurninginum um trivna› og virksemi á útoyggjunum.

Fólk ymsasta›ni úr landinum sita í nevndini, har Olga Biskopstø er forma›ur.

Uppgávan hjá útoyggjanevndini er at or›a ítøkilig menningaruppskot fyri útoyggjarnar, at tí›ar- og ra›festa uppskotini og at l‡sa møguleikarnar fyri var›andi menningararbei›i.

Útoyggjanevndin fór undir sítt arbei›i fyrr í ár, og fram til august mána›i var arbeitt vi› skrásetingararbei›i, og fólk, fyritøkur, stovnar og onnur vóru bi›in um ymsar frágrei›ingar. Eisini hevur útoyggjanevndin fleiri fer›ir lagt dent á, at øll eru vælkomin vi› uppskotum og vi›merkingum til nevndina.

Seinasti parturin av arbei›num er at skriva áliti›, og broytta ætlanin er nú, at álití› skal vera li›ugt sí›st í hesum árinum.